Fylgiskjal 19

**Tórshavn 20. januar 2025**

**Viðmerkingar til uppskot til broytingar í løgtingslóg um sjófeingi:**

Feløgini hava í hesum skrivi einans gjørt viðmerkingar til tann partin av uppskotinum, sum snýr seg um landingar av svartkjafti, makreli og norðhavssild.

Feløgini fyri arbeiðsfólk á landi mæla staðiliga ímóti at seta partin av uppskotinum í gildi, sum snýr seg um landingartreytir hjá uppsjóvarflotanum. Fyri arbeiðsfólk og handverkarar o.o., sum starvast í vinnuni á landi, er uppskotið ein vanlukka, tí hetta leggur upp til, at upp til helvtin av svartkjafti, makreli og norðhavssild kann landast uttanlanda.

Hetta er beint tvørturímóti øllum ætlanunum um at gagnnýta og virðisøkja okkara tilfeingi, og at tilfeingi skal koma fólkinum til góðar.

Undirritaðu feløg hava hundraðtals limir, sum starvast í uppsjóvar- og ídnaðarvirkjum kring alt landið. Fyri hesi fólk elvir tað til lægri inntøkur og gongur hart útyvir livikorini í hesum familjum. Eisini hevur tað neiliga ávirkan á allar avleiddar vinnur, sum eru tongdar at hesum virkjum.

Júst spurningurin um virðisøking av okkara tilfeingi er nakað, sum landsstýrismaðurin og politiska skipanin ferð eftir ferð hava víst á er neyðugt at fremja, og hvussu stór virðir fara fyri skeyti, um fiskurin ikki verður meirvirkaður. Tí er tað óskiljandi, at parturin, sum kann landast uttanlands, verður øktur.

Í samgonguskjalinum frá 2022 verður annars borið fram:

> "Tilfeingið er ogn Føroya fólks og skal tí umsitast soleiðis, at tað skapar virði, menning og framburð kring landið, og at virðini koma fólkinum til góða."

Akkurát hetta uppskotið ger beint tað øvuta við at broyta landingartreytirnar og økja um partin sum kann fara uttanlanda. Hetta er við til at máa grundarlagið undan uppisjóvarvinnuni á landi, minkar virðisøking og fremur avgjørt ikki menning.

Annars hava vit havt fatan av, at politiska skipanin er fegin um, at uppsjóvarvirki eru kring landið, og at tað onkusvegna tyktiskt vera breið politisk semja um, at fiskur veiddur undir føroyskum flaggi, sum meginregla skal um føroyskan keikant til virðisøkingar.

Tað er harumframt heilt løgið, at ongin greining ella lýsing av avleiðingum av hesum er í uppskotinum yvirhøvur.

Her er onki lýst ella greina um avleiðingar fyri teir mongu løntakararnar, sum fara niður í inntøku, tað er einki skrivað um avleiðingar fyri kommunur ella økini, har hesi virki eru, tað er ongin lýsing av avleiddum vinnum, og tað er ongin grening av, hvørja ávirkan hetta fer at hava á uppsjóvar- og ídnaðarvirki.

Feløgini halda tað vera sera løgið, at ætlanir eru um, frá ovastu politisku leiðslu, at skunda undir at landa uttanlands hjá einum parti av flotanum, sum í dag klárar seg væl, meðan arbeiðsfólk á landi, hvørs inntøkur eru treytaðar av tilfeingi og atgongt til rávøru, mugu rinda prísin fyri hesum.

Feløgini heita staðiliga á landsstýrismannin um at strika partin í uppskotinum, sum snýr seg um landingar uttanlands, og heldur miðsavna seg um, hvussu meir kann fáast til vega og hvussu vit virðisøkja uppaftur meir - tað er rætti vegur at fara. Sjálvandi skal tilfeingið og virðini umsitast soleiðis, at tað skapar virði, menning og framburð kring landið, og at virðini koma fólkinum til góða.

Við fakfelagskvøðu,

Føroya Arbeiðarafelag

Havnar Arbeiðarafelag

Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag

Landsfelag Handverkaranna

Havnar Arbeiðskvinnufelag

Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag